Kunning til Løgtingsins vinnunevnd um feil í roknskapinum fyri Barsilsskipanina 2018, 2019 og 2020

Feilur staðfestur í roknskapinum fyri Barsilsskipanina
Mánadagin 9. november fekk Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunning frá TAKS, ið umsitur Barsilsskipanina og Barsilsgrunnin, at roknskapurin 2018, 2019 og 2020 ikki er rættur.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið fekk 11. november skrivliga kunning frá TAKS um málið, sí hjálagt skriv. Í sambandi við eftirlit hjá Landsgrannskoðanini av Barsilsskipanini varð komið fram á ein feil í skipanini, ið hevur við sær, at útgjøld til eftirlønir ikki eru útreiðsluførd í rakstrinum, men skrásett í fíggjarstøðuni.

TAKS hevur staðfest, at feilurin er íkomin, tá ið KT-skipanin varð broytt í sambandi við, at lógin um barsilsskipan varð broytt við lóg nr. 166/2017. Broytingin hevði við sær, at eftirlønargjaldið skuldi leggjast afturat barsilspeninginum og ikki longur dragast frá barsilspeninginum, áðrenn hann varð goldin út.

Í stuttum hevur feilurin við sær, at útgjøld til eftirlønir ikki eru útreiðsluførd í rakstrinum, og tí er Barsilsgrunnurin ikki kravdur eftir fullari upphædd, sum Barsilsskipanin hevur goldið út.

TAKS hevur staðfest, at øll útgjøld frá Barsilsskipanini til persónar og arbeiðsgevarar eru røtt. Sostatt hevur feilurin ikki havt ávirkan á borgarar og vinnu, men hevur heldur havt við sær eina skeiva mynd av, hvørjar rakstrarútreiðslur skipanin hevur havt, og hvussu stór samansparingin hevur verið í Barsilsgrunninum.

Ábøtur á skipanina
Umhvørvis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið og TAKS umrøddu á fundi 16. november avbjóðingarnar, og hvussu sleppast kann undan, at slíkt endurtekur seg.

TAKS ásannar, at regluliga eftirlitið ikki hevur verið nøktandi, men fer at styrkja um eftirlitið, soleiðis at tílíkir feilir kunnu varnast beinanvegin.

TAKS greiddi frá, at útgjøldini úr Barsilsskipanini fara um BAMN-skipanina. BAMN-skipanin er frá 2001 og hevur sum heild tørv á at verða dagført. Skipanin er ikki serliga smidlig at arbeiða við og er heldur ikki serliga gjøgnumskygd, m.a. eru avmarkaðir møguleikar at trekkja dátur úr skipanini til at gera dynamiskar framskrivingar.

Fundurin samdist um, at TAKS fer undir at kanna møguleikan at nýmenna skipanina í síni heild og at meta um kostnaðin av tí.

Ávirkan á samansparingina í Barsilsgrunninum
Av tí at útreiðslur til eftirløn ikki eru kravdar úr Barsilsgrunninum, hevur feilurin ávirkað samsparingina í Barsilsgrunninum soleiðis:

2018	-4.1 mió.kr.
2019	-7.1 mió.kr.

Samsparingin í Barsilsgrunninum var bókført at vera 11,1 mió.kr. við ársbyrjan 2020. Ikki-útreiðsluførdu eftirlønargjøldini hjá Barsilskipanini vóru sostatt longu við ársbyrjan 2020 størri enn samansparingin í grunninum. Aftrat hesum kemur, at Barsilskipanin fer at hava hall í 2020, sum sambært seinastu tølunum frá TAKS verður mett til áleið 14 mió. kr..

Barsilsgrunnurin kann ikki hava negativa samansparing, og tí er Fíggjarmálaráðið farið at kanna, hvussu málið skal avgreiðast játtanarliga og roknskaparliga.

Ávirkan á uppskotið til broyting í løgtingslóg um barsilsskipan

TAKS hevur kunnað um, at rættingarnar í roknskapinum 2020 einans hava avmarkaða ávirkan á framskrivingarnar, ið eru nýttar í lógaruppskotinum. Umhvørvis- og vinnumálaráðið fekk 16. november eina nýggja meting av rakstrinum hjá Barsilsskipanini, og nýggj framskriving er gjørd fram til 2026. Nýggja framskrivingin sæst niðanfyri.

Framskriving av Barsilsskipanini 2019-2026 við 4 vikum eyka og hækkaðum barsilsgjaldi								
Ár	**2019**	**2020**	**2021**	**2022**	**2023**	**2024**	**2025**	**2026**
Lógarbundin inngjøld								
Frá persónum	68,7	70,5	87,1	88,4	89,7	91,0	92,4	93,8
Frá arbeiðsgevarum	73,2	75,0	91,7	93,0	94,4	95,9	97,3	98,8
Tilsamans	**141,9**	**145,4**	**178,7**	**181,4**	**184,1**	**186,9**	**189,7**	**192,5**
Lógarbundnar útreiðslur								
Til persónar	99,5	103,9	104,9	118,0	119,2	120,4	121,6	122,8
Eftirløn til persónar	5,1	6,2	7,3	9,4	10,7	12,0	13,4	14,7
Til arbeiðsgevarar	44,1	42,3	42,7	43,2	43,6	44,0	44,5	44,9
Eftirløn til arbeiðsgevarar	2,2	2,5	3,0	3,5	3,9	4,4	4,9	5,4
Sosial gjøld (arbeiðsgevaragjøld)	2,0	2,1	2,1	2,4	2,4	2,4	2,4	2,5
Tilsamans	**152,9**	**157,1**	**160,1**	**176,4**	**179,8**	**183,2**	**186,7**	**190,3**
Útreiðslur til umsiting (TAKS)	2,4	2,4	2,1	2	2	2	2	2
Úrslit (við 4 vikum eyka)	**-13,46**	**-14,04**	**16,56**	**3,00**	**2,33**	**1,65**	**0,96**	**0,26**

Sum sæst á talvunum omanfyri, broytast framskrivingarnar av útreiðslunum ikki munandi, eftir at TAKS hevur rættað rakstrarroknskapin 2020. Ein munur er tó, at rakstrarøkingin 2022-2026 í lógaruppskotinum varð mett at verða 1,5% árlig, meðan nýggja metingin hevur eina árliga øking uppá 1%. Orsøkin til tað er, at umleið ein triðingur av teimum, ið fáa barsilspening, raka útgjaldshámarkið uppá 25.000 kr., og tí fer tann parturin av útgjøldunum ikki at vaksa.

Ein onnur broyting er, at TAKS hevur endurskoðað metingina av inngjøldunum fyri 2020. Inngjøldini verða mett at verða góðar 3 mió.kr. lægri enn í lógaruppskotinum. Yvirskipað kann tó sigast, at um lógarbroytingin verður samtykt, sum skotið er upp, so verður mett, at Barsilskipanin er fíggjarliga haldfør.